Skála-EB/Streymur 3-1 (0-0):

# Spæligladir skálamenn vunnu fyri fyrstu ferð

**Fyritreytirnar hjá EB/Streymi versnaðu longu eftir tíggju minuttir heilt nógv, tí tá varð annar miðverjin rikin av vøllinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Skálamenn fingu fyrstu sigurin í bestu deildini yvirhøvur, tá teir sunnudagin høvdu vitjan av EB/Streymi*

Fótbóltslagið á Skála fekk seinnapartin sunnudagin innspræningina, sum teir í fjúrtan landskappingardystum hava bíðað eftir.

EB/Streymur vitjaði. Tá tíggju minuttir vóru farnir, sá miðverjin Christian Carlsson gult fyri aðru ferð. Eingin annar vegur var so enn undir brúsuna, og við tíggju monnum var uppgávan ov stór hjá Trygva Mortensen og hansara monnum. Marni Djurhuus, sum hevur verið á vongverjanum í høgru og sum hesa ferð vikarieraði fyri Ronnie Samuelsen mitt á miðvøllinum, fór í miðverjuna, Sorin Anghel fór aftur á miðvøllin, og so var Jón Sigurd Gleðisheygg einsamallur á toppinum.

Dygst eftir útvísingina var tvær ferðir um reppið, at undirmannaðu gestirnir fingu mál. Í fyrra førinum var Teitur Joensen púra leysur í høgru. Í staðin fyri at royna ímóti málinum, spældi hann upp á tvørs, men Jón Sigurd Gleðisheygg fekk ikki fatur á. Í seinna førinum var tað Sorin Anghel, sum var leysur í málteiginum. Eisini hann royndi at spæla upp á tvørs í staðin fyri at skjóta, og so spurdist einki burturúr.

### Nýttu breidd og longd

Skála hevði dreingjaliðsspælaran Heina Christiansen í málinum fyri leikbannaða Eugen Voda. Burtursæð frá næstan royndunum, sum vórðu nevndar omanfyri, hevði málverjin ikki so nógv at gera. Men tá støðan var 2–1, var um reppið, at EB/Streymur skoraði. Eftir álop í høgru varð spælt út frá til liðformannin Jákup Martin Joensen, sum smekkaði til, men bólturin fór tíggju centimetrar omanfyri tvørtræið.

Skála misti í 1. hálvleiki miðverjan Paula Poulsen, sum varð skaddur í munninum. Tá varð Rúni Rasmussen fluttur í miðverjuna, og Ronnie Hansen kom inn á vongverjan.

Teir á heimaliðnum vóru væl upplagdir. Teir brúktu alla vallar breiddina, spældu í dýpdina til skjótu álopsmenninar, og harvið dugdu teir væl at gera nyttu av, at teir vóru ellivu ímóti tíggju. Sammett við fyrr í ár hildu teir ikki so nógv fólk aftanfyri bóltin, men tað kundi sjálvsagt komast av, at teir vóru fleiri á vøllinum enn mótstøðumenninir.

At Skála ikki kom á odda í 1. hálvleiki kunnu teir í EB/Streymi fyrst og fremst takka Gunnari á Steig fyri. Hann var ein sannur brandur í málinum. Einar tríggjar ferðir bjargaði hann framúr væl, og tá bólturin ta einu ferðina fór framvið honum, brast hann í samankomingina.

### Málríkt

Í 2. hálvleiki komu málini, sum alt fyrra umfarið høvdu verið væntandi. Ein tími var farin, tá miðvallarin í vinstru, Kári Nielsen, setti hol á. Hann royndi við skoti av brotsteigarmarkinum, bólturin kitlaði ein av verjuspælarunum, áðrenn hann fór tætt inn við stólpanum.

Jónhard Frederiksberg, sum saman við Alexandur Johansen var sera eyðsýndur í álopinum, økti til 2–0. Hann rann einsamallur ímóti málinum, sneiddi framvið málverjanum og legði bóltin í málið.

EB/Streymur svaraði aftur við frísparkskombinatiónini, sum teir eisini fyrr í summar hava fingið nógv burturúr. Marni Djurhuus spældi Pazek, sum spældi út frá til Jákup Martin Joensen, og hann skoraði.

Hanus Thorleifsson, sum fyrstu ferð fekk møguleikan frá byrjan, var í høgru upphavi til 3–1 málið. Hann sneiddi framvið trimum og gjørdist einsamallur við málverjanum. Í staðin fyri at royna sjálvur, trillaði hann bóltin upp á tvørs til rumenska miðvallaran, og so var mál.

Skála hevði fleiri aðrar møguleikar. Eitt nú royndi Jonhard Frederiksberg eina ferð at sneiða framvið málverjanum. Tað miseydnaðist, og einki var at siga til, at púra leysi Alexandur Johansen iðraði seg. Men tað mundi alt vera gloymt, tá skálamenn fóru av vøllinum við trimum stigum og við góðu tíðindunum úr Vági um, at TB hevði tapt stórt har suðuri.

### Dysturin í tølum

Skála-EB/Streymur
3-1 (0-0)
1-0: Kári Nielsen 54
2-0: Jonhard Frederiksberg 85
2-1: Jákup Martin Joensen 86
3-1: Alexandru Gabor 88
**Dómari:** Niklas á Líðarenda

**Skála:** Heini Christiansen – Rúni Rasmussen, Pauli Poulsen, Bent Djurhuus, Áki Petersen – Hanus Thorleifsson, Pauli Hansen, Gheorghe Callo, Kári Nielsen – Alexandur Johansen, Jonhard Frederiksberg
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Andrzej Pacek, Christian Carlsson, Eyðfinn Joensen – Teitur Joensen, Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Jón Sigurd Gleðinheygg

B71-KÍ 1-0 (0-0):

# Sandoyingar tryggir

**Við sigrinum á KÍ flutti B71 seg upp á triðja plássið á stigatalvuni, og nú stríðast teir brádliga fyri uppflyting**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Bæði KÍ og B71 eru góð dømi um, hvussu javnt alt hevur verið í næst bestu deildini hetta kappingarárið - tá sær verður burtur frá oddaliðnum úr Vágunum.

Sandoyingar vórðu av mongum mettir sum eitt sera gott boð til uppflytingina, men stóran part av árinum hava teir verið staddir ógvuliga niðarliga á talvuni, og til tíðir hevur talan beinleiðis verið um niðurflytingarvanda.

Hesin spøkti eisini framvegis, tá KÍ kom á vitjan leygardagin. Eins og sandoyingar, so hevði KÍ havt tað trupult stóran part av árinum, men í seinnu hálvu hevur gingið væl, og undan dystinum høvdu teir vunnið seg upp á triðja plássið í deildini.

Her steðgði tað tó í fyrstu atløgu hjá klaksvíkingunum, tí tað varð B71, sum vann dystin á Sandi. Talan var alla tíðina um ein javnan dyst, har bæði liðini høvdu sínar møguleikar at leggja seg á odda, men leingi sá tó út til, at talan skuldi gerast um málleysan javnleik.

Fram móti dystarenda eydnaðist tó sandoyingunum at avgera, tá Kristoffur Vidtfeldt brádliga kom at standa væl fyri.

Fyri heimaliðið ber sigurin fyrst og fremst við sær, at teir nú eru komnir burtur úr vandinum fyri niðurflyting. Somikið javnt er í løtuni á stigatalvuni, at teir ístaðin yvirtóku triðja plássið frá klaksvíkingunum, og megna teir at halda fast um verandi støðuna, verða tað teir, sum skulu spæla ímóti næst niðasta liðnum í fyrstu deild um upp- og niðurflyting.

Klaksvíkingar duttu sum sagt av bronsuplássinum, men hóast hetta, so er eingin orsøk hjá teimum at stúra fyri teimum báðum seinastu dystunum. Tilveran í deildini til komandi kappingarárið er mest sum tryggjað, og enn hevur liðið góðan møguleika at ogna sær heiðursmerki, men so skal talan helst verða um sigur, tá teir komandi vikuskifti fara til Vágs, har heimaliðið skal stríðast fyri yvirliving. B71 fer tá Leirvíkar har talan kann gerast um dyst, sum fær avgerandi týdning fyri rættin at spæla um upp- og niðurflyting..

### Dysturin í tølum

B71-KÍ 1-0 (0-0)
1-0: Kristoffur Vidtfeldt

Sumba-HB 1-5 (1-2):

# So bragdaði hjá HB

**Enn eru teir á niðasta plássinum, men avrikið móti Sumba man geva HB góðar vónir undan seinastu dystunum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

HB hevur størsta partin av árinum verið í sera tungum sjógvi, og seinastu vikurnar hava teir verið fastir á botnsessinum, men nú røkist kanska fyri, at okkurt fer at broytast í so máta.

Leygardagin høvdu teir torføran útidyst í Sumba, men tað skuldi vísa seg, at hetta als ikki var nakar ov stóru biti hjá HB, sum hevur styrkt nakað um liðið í endaspurtinum við at seta fleiri veteranar á vøllin.

Í fyrra hálvleiki rakk hetta eisini til eina 2-0 leiðslu, áðrenn René Thomsen stutt fyri hálvleik minkaði um munin, men hetta var tó ein stokkut gleði hjá heimaliðnum. Í seinna hálvleiki settu gestirnir nevnliga fulla ferð á, og eftir 12 minuttum stóð 1-5, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Hóast sigurin, so vann HB seg ikki av aftasta plássinum, nú øll hini botnliðini eisini vunnu sínar dystir, men tað bøtti í øllum førum um útgangsstøðið undan teimum báðum seinastu dystunum. Her skulu teir leygardagin taka ímóti ÍF, og tað kann væl vísa seg at gerast ein sera áhugaverdur dystur. Sumbingar fara tá vestur til Vágarnar, har teir neyvan skulu rokna við at taka frá oddaliðinum í deildini.

### Sumba-HB 1-5

0-1: Gunnar Mohr
0-2: Heini Gaard
1-2: René Thomsen
1-3: Heini Gaard
1-4: Danny Rasmussen
1-5: Gunnar Mohr



# FCK vísti mannafólkaavrik

**Todi Jónsson stóð leikliga sterkur í myndini, men tað togaði niður, at hann ikki megnaði at fáa mál burturúr góðum møguleikum**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Eftir tvey ikki sannførandi avrik og tvey 3–0 tap í Jyllandi vísti FCK aftur tenn í Parkini í Keypmannahavn, har 18.930 áskoðarar vóru eygnavitni til 1–0 sigurin ímóti grannunum úr AB.

Carsten Fredgaard, sum aftur hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í vinstru, skoraði málið beinleiðis upp á fríspark, tá knappir tjúgu minuttir vóru farnir. Frísparkið var framt ímóti Todi Jónsson.

FCK avrikið var sannførandi. AB hevði ikki ein málmøguleika, meðan FCK sat á tí mesta og hevði fleiri møguleikar.

Sambært donsku miðlunum, so vóru tað serliga tríggir spælarar á heimaliðnum, sum gingu undan, tá tað skuldi spælast og stríðast fyri at vinna. Teir vóru miðvallar veteranarn ir Peter Nielsen og Erik Mykland og so Todi Jónsson.

Todi var í álopinum saman við Peter Møller, meðan Jörgen Pettersson var á beinkinum og Zuma als ikki var við. Tá tað restaðu tveir minuttir, varð Todi útskiftur við svenska álopsmannin.

### Møguleikar og upplegg

Todi Jónsson tóktist sera væl upplagdur. Heilt tíðliga sneiddi hann framvið fleiri, áðrenn hann úr átjan metrum smekkaði til, men bólturin fór omanfyri. Eina aðru ferð í 1. hálvleiki varð hann spældur leysur í brotsteiginum, men ta ferðina bjargaði AB málverjin við góðari beinparadu.

Í 2. hálvleiki átti Todi at havt økt um leiðsluna. Eftir innlegg úr vinstru, var hann væl fyri at stúta, men úr níggju metrum rakti hann ikki nóg væl, og bólturin fór væl við síðuna av.

Todi hevði onkur góð upplegg, og serliga ta ferðina, tá hann við hælinum snilt spældi eitt tvey saman við Carsten Fredgaard, átti hesi seinni at havt skorað.



*Todi Jónsson var millum mest eyðsýndu FCK-leikararnar í dystinum móti AB, og var við í nógvum av skapandi spælinum hjá FCK. Einasta minussið mundi tó vera, at tað ikki eydnaðist føroyska álopsmanninum at skora*

### Spennandi vika

Eftir dystin var FCK venjarin Hans Backe væl nøgdur. Bæði við álopsspælið og við, at tað endiliga hevði eydnast at halda tætt í verjuni. Tað hevði FCK ikki gjørt síðani eina ferð í apríl mánað. Men venjarin helt, at hansara menn áttu at havt skorað fleiri mál.

Venjarin var skjótur um Oyrasund. Hann fór til Hälsingborg, har Djurgården úr Stokhólmi var á vitjan. Hósdagin skulu FCK og Djurgården spæla í UEFA Cup kappingini. Tað verður roknað við tættari uppgerð, har tað avgjørt ikki verður nakar favorittur.

# Molde hóttir Rosenborg

**Oddaliðið megnaði leygarkvøldið bara 1–1 á heimavøllinum í Tróndheimi ímóti Vålerenga, meðan Molde sunnudagn vann 2–0 á niðurflytarunum úr Kristiansand**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Rosenborg er framvegis besta boðið upp á norska meistaraskapin. Og talan verður um púra óvæntað úrslit, um tað ikki fer at eydnast teimum úr Tróndheimi at endurvinna NM. Men Rosenborg hevur komandi vikurnar, tá síðstu og avgerandi umførini í landskappingini verða á skránni, eisini europeisku meistarakappingina at hugsa um.

Kanska hugsaðu teir longu leygarkvøldið ov nógv um fyrsta Europa Cup umfarið, sum er á skránni í kvøld og í annað kvøld. Heilt ofta fyrr í ár hevur Rosenborg skorað týdningarmikil mál í síðstu løtu. Tað gjørdu teir ikki leygarkvøldið. Men tá var tað mótstøðuliðið Vålerenga, sum í 90. minutti frammanfyri 20.587 áskoðarum javnaði til 1–1. Harald Brattbakk hevði í 1. hálvleiki skorað málið, sum leingi sá út til at vera nóg mikið hjá Rosenborg fyri at fáa øll stigini.

### Molde er við

Við sigri á botnliðnum og longu niðurflutta Start úr Kristiansand hevði Molde á heimavølli sunnudagin møguleika at minka um munin niður í trý stig til oddaliðið.

Tað eydnaðist. Molde vann 2–0, sjálvt um avrikið í 1. hálvleiki ikki var sannførandi. Fyrra málið fingu teir, tá fyrra umfarið var ein minutt og 26 sekund eldri enn tey trý korterini. Teir í Start vóru ikki heilt glaðir fyri dómaran, sum teir ikki hildu dugdi á at skyna klokku. Hann hevði lagt ein minutt afturat vanligu leiktíðini.

Molde venjarin er sjálvandi væl nøgdur við støðuna, sum nú hevur tikið seg upp, men hann undirstrikaði, at málið hjá Molde framvegis er at vinna heiðursmerki, og at teir taka ein dyst í senn. Næsta umfarið verður ikki spælt fyrrenn á mikkjalsmessu. Tá skal Molde spæla á útivølli ímóti Vålerenga, sum leygarkvøldið altso megnaði javnleik í Tróndheimi.

Lyn vann 2–0 á Stabæk, og í Stavanger eydnaðist tað Sogndal, sum rættuliga hevur fótað sær, at greiða 1–1. Håvard Flo skoraði í 67. minutti, men heimaliðið javnaði, tá tað restaðu fýra minuttir.

Lillestrøm kom longri burtur frá botninum, tá teir á heimavølli vunnu 2–0 á Bodø/Glimt, og illa stadda Moss megnaði á heimavølli at vinna 1–0 á Bryne.

Odd Grenland skuldi í gjárkvøldið spæla á heimavøllinum í Skien ímóti Brann úr Bergen.



*Molde er bert trý stig frá oddaliðnum úr Rosenborg, nú bert tvey umfør resta av norsku kappingini. Jákup Mikkelsen var tó sum vant á beinkinum, tá liðfelagarnir um vikuskiftið vunnu 2-0 á Start*

## Bridgedeild Kaggans Havnarmeistari

**Í farnu viku varð skipa fyri Havnarmeistaraskapinum fyri feløg í bridge**

BRIDGE
*sportal.fo*

Tað var Havnar bridgefelag, ið var fyriskipari av kappingini og við Jóannes Mouritsen á odda var hetta sera væl úr hondum greitt.

Kappingin gjørdist ongantíð spennandi, Bridgedeild Kaggans legði seg skjótt á odda og endaði eisini klárt fremst. Hvørt felag hevði tvey lið við í kappingini og vinnandi felagið gjørdist tað, ið fekk flest stig tilsamans.

**Samlaða støðan:**
1 Bridgedeild Kaggans
152 stig
2 Havnar Bridgefelag
114 stig
3 Nýggja Bridgefelag
85 stig

Tey, ið leiktu við Bridgedeild Kaggans vóru:

**BK1**
Bogi Simonsen – Rói á Rógvu Joensen
Arnbjørn Sivertsen – Hans Jacob Petersen

**BK2**
Marjun Restorff – Arnleyg Mikkelsen
Niels Nielsen – Eyðun Jensen
Robert Langaard – Eyðun Anthoniusen
Petur Anfinn – Eilif Petersen